Dunga-annelena 100 ár

Í morgin 12. juli fyllir Anna Helena Hansen, vanliga rópt Dungaannelena í Sørvági, 100 ár. Anna Helena er fødd og uppvaksin í Froðba. Foreldur hennara vóru Elsa Margretha og Poul Øster.

Elsa Margretha var fødd Petersen og ættað úr Lamba. Poul var føddur og uppvaksin í Eystrum í Porkeri. Elsa Margretha og Poul áttu fimm børn. Umframt Annu Helenu áttu tey eina aðra dóttur og tríggjar synir. Hin dótturin æt Adeleita og var gift við Hans Paula Kjærbech, vanliga róptur Nelliepalli á Sevmýru á Tvøroyri.

Synirnir itu Johan, Petur og Poul. Jóhan búsettist á Sevmýru, Petur uppi undir Innara Hvali og Poul inni á Hvítanesi.

Sum ung hevði Anna Helena húsligt arbeiði og tænti hjá Olivuri Effersøe, sýslumanni. 20 ára gomul fór hon at læra skrædderaseyming og síðani arbeiddi hon á seymistovuni hjá Mariu og Anna Helenu við Á á Tvøroyri til hon gifti seg.

Tað var í 1904, at Anna Helena giftist til Sørvágs.

Hon giftist við Vilhelm Hansen, vanliga róptur Dunga-Vilhelm. Tey búsettust í Sørvági og fingu fýra børn. Í 1905 fingu tey sonin Eli. Í 1908 tvíburðarbrøðurnar Viggo og Arnold og í 1920 dóttirina Estrid. Anna Helena gjørdist einkja ólavsøkuaftan 1942. Elsti sonurin Eli doyði av sjúku í september 1944, bert 38 ára gamal. Annar av tvíburðunum, Viggo, doyði í mai 1977. Eftir á lívi eru Arnold, búsitandi í Sørvági og dóttirin Estrid, sum giftist til Klaksvíkar í 1942.

Nú Anna Helena rundar tey 100, eigur hon 10 ommubørn á lívi, og langommubørnini eru 20 í tali. Ommubørnini vóru upprunaliga 11. Elsti ommusonurin, sum æt Vilhelm, doyði í januar 1943, 1 ára gamal.

Tey seinastu sjey árini hevur Anna Helena verið búsitandi á Ellisheiminum í Vágum. Anna Helena hevur verið røsk og arbeiðssom. Til hon varð 93 ára gomul, búði hon í heimi sínum í Sørvági og gjørdi hon alt vanligt arbeiði í húsinum og bant mangt eitt plaggið bæði til ommubørnini og til langommubørnini. Men tá fóru eyguni brádliga at bila og eftir egnum ynski kom hon tá á Ellisheimið. Anna Helena hevur livað væl til fyri nøkrum heilt fáum mánaðum síðani. Tá gjørdist hon sjúk og endin var, at hon fyri sløkum tveimum mánaðum síðani fekk annað beinið ambuterað á Landssjúkrahúsinum í Havn. Men hon er kortini komin so mikið fyri seg aftur, at hon nú — tveir dagar áðrenn 100 ára føðingardagin — situr frammi.

Vit ynskja Annu Helenu hjartaliga tillukku við 100 ára degnum.

Malla Samuelsen fyllir sjeyti ár

Í dag, mikudagin 11. juli, fyllir ein kend havnarkona sjeyti ár. Havnarkonu mugu vit siga hana at vera, tó at hon varð borin í heim norðuri á Kirkju í Fugli og alla sína tíð hevur følt seg knýtta at Fugloynni og tí fólki, ið har býr. Men hon fór tíðliga heimanífrá. Fyrst var hon næmingur á Føroya Fólkaháskúla, og so fór hon niður at tæna, og sum tað skilafólk, hon altíð hevur verið, so tók hon við tí besta, sum hon hoyrdi og sá bæði á háskúlanum og seinni niðri millum fremmand menniskju, og alt hetta kom henni til góðar seinni í lívinum.

Malla giftist 24 ára gomul í 1935 við Karl

Samuelsen, Karl í Horni, og tey festu búgv við Landavegin suðuri í Havn, og har hava tey livað eitt ríkt lív saman við sínum trimum børnum.

Men Malla var ikki nøgd við tað einans at ganga heima sum húsmóðir, tí hon hevði stóran áhuga fyri øllum almennum viðurskiftum og tók eldhugað lut í politiskum arbeiði, og hon var ongantíð í iva um, hvar ið hennara arbeiði í føroyskum politikki skuldi leggjast, tað mátti vera í sjálvstýrisflokkinum, ikki einans tí, at hon frá barnsbeini var innlivað í henda flokkin, men eisini tí, at hon var sannførd um, at sjálvstýrispolitikkurin var tann einasti skilagóði politikkur, sum verdur var at styðja.

Hon var eisini sannførd um, at skuldi rættiligt skil fáast á føroyskan politikk, so mátti kvinnan taka størri lut í honum, enn hon higartil hevði gjørt, og tí tók hon eldhugað lut í kvinnufelagsarbeiðinum. Malla varð vald inn í Tórshavnar býráð í 1956 og sat har í 4 ár. Sum tað hevur verið við sjálvstýrisflokkinum, so var tað eisini við Mallu. Hon var serliga hugað fyri mentunarligum og sosialum arbeiði, og hon gjørdist formaður í skúlanevndini í býráðnum, og tað havi eg hoyrt frá øðrum býráðslimum, at hon gjørdi eitt dygdargott arbeiði bæði viðvíkjandi skúlanum og í sosialum spurningum. Malla hevur eisini verið valevni til løgtingsval hjá sjálvstýrisflokkinum, men tíverri hevur tað ongantíð eydnast at fingið hana

Framhald á síðu 11

HOYVÍK - DR. JAKOBSENSGØTA

FRUKT- OG GRØNMETISVIKA



GRANNY SMITH SUREPLIR 10 stk. 6.95

ANANAS pr. stk. 19.95

KIWI fruktir pr. stk. 4.50

DADLUR 1/4 kg 6.95



Nýggj don. eplir	pr. kg	3.00
Nýggj don. blomkál	pr. stk.	3.95
Danskar ertrar	400 gr.	7.95
Danskar agurkur	pr. stk.	2.95
Donsk salathøvd	pr. stk.	1.95
Grønt Chili pipar	pr. kg.	44.00
NÝGGJAR GULARØTUR	1 1/2 kg	7.95
FERSKNER	pr. kg	9.95
MELÓNIR i neti	pr. 1/2 kg	8.95
HUNANGS MELÓNIR	pr. stk.	10.95



AVOCADO pr. stk. 6.95

Reyðar BLOMMUR pr. kg. 9.95

Gular BLOMMUR pr. kg 12.95

KJØTTILBOÐ:

Summartilboð:

FRYST NEYTAKJØT (Filét) Uml. 2 kg 1/1 kg 45.00

FORLORIN HARA 1/1 kg 13.90 Vanl. prísur 15,90

KOTELETTIR 1/1 kg 32.90 Vanl. prísur 39,90

RÆSTUR FISKUR 1/1 kg 19.90

Tilboðini er frá 11/7 til 14/7 ella so leingi vøra er eftir

KEYPSSAMTØKAN